Vatnsoyrar, juni 2011.

Kæru náðisystkin.

So eru summarlegurnar í Zarepta aftur í hondum, og vilja vit enn einaferð geva tykkum høvi til at lata vørur til arbeiðið. Hjartans tøkk skulu tit hava fyri hjartalag og gávumildi, sum tit í mong ár hava víst í tænastuni við at senda bakivørur og aðrar vørur til legurnar.

**Koyringin hjá bussinum til summarlegurnar byrjar týsdagin tann 28. juni, og endar mikudagin tann 10. august.**

**Norðoyggjar:** *Vøran eigur at vera inni hjá Katrin & Jógvan Karl Joensen undir Klakki 30 í seinasta lagi týsmorgun kl. 11. - Tlf. 457413 - 217413*

**Eysturoy:** *Vøran eigur at vera inni á hesum støðum kl. 12.00 týsdag:*

*Á Toftum: Nebo.*
*Í Runavík: Berøa.*
*Í Fuglafirði: Siloa.*
*Í Leirvík: Hebron.*
*Í Gøtu: Filadelfia.*
*Í Søldafirði: Elim.*

*Til niðanfyri nevndu støð í Eysturoynni koyrir bilurin hesar týsdagar:*
*28. juni - 12. juli – 26. juli & 9. august:*
*Á Skála: Nerija.*
*Á Eiði: Mizpa.*
*Vøran eigur at vera inni kl. 12.00.*

**Streymoy:**

*Kollafjørður: Zion. - Vøran eigur at vera inni kl. 13.00 týsdag.*

*Tórshavn: Úti á Fløtum. - Vøran eigur at vera inni kl. 17.30 mikudag.*

*Kaldbak: Nasaret. - Bilurin koyrir hesar mikudagar:*
*29. juni - 13. juli & 3. august*
*Vøran eigur at vera inni kl. 17.30.*

**Suðuroy:** *Bilurin verður í Suðuroynni hesar hósdagar:*
*30. juni - 21. juli & 4. august.*
*Vøran eigur at vera inni á hesum støðum kl. 11.30:*
*Hvalba: Vitnið.*
*Tvøroyri: Salem.*
*Porkeri: Betania.*
*Vágur: Bethel.*

Kunnu tit skipa soleiðis fyri, at onkur átekur sær at minna á hvørja ferð, bilurin kemur. – Eisini ber til at margfalda brævið, so tey, ið hava áhuga, kunnu fáa eitt eintak.

Tey á teimum støðum, har vøra ikki verður avheintað, og sum ynskja at vera við í hesum verki, eru vælkomin at seta seg í samband við okkum, og vilja vit fegin skipa fyri flutningi.

Er okkurt, ið tit ynskja at spyrja um, eru tit vælkomin at ringja til Zarepta á tlf. 332140.

Vinarlig heilsan, John í Skemmuni, Jens Bech & John Færø.